

*Eitt av krígsminnunum á Strondum, sum hevði til endamáls at verja innsiglingina til Skálafjørðin undir seinna heimsbardaga*



*Arthur Johansen, borgarstjóri í Sjóvar Kommunu (t.h.), og Sámal Bláhamar frá Toru Tourist hava ætlanir um at selja kelduvatn til ferðafólk*

vitjanini á Snælduni fekk eg tað hugskotið, at hetta mátti vera eitt upplagt mál hjá ferðavinnuni at vitja, sigur Sámal Bláhamar.

Hann heldur, at sum í nógvum øðrum bygdum í Føroyum, er fult av støðum og lokalari orku, sum kann nýtast til at menna eitt nú ferðavinnuna.

– Ein kann sammeta tað við, at her eru nógvar góðar rávørur til eina góða køku. Tað er bara at fara undir at baka, sigur Sámal Bláhamar.

Hann setti seg tí í samband við borgarstjóran, ið tók sera væl ímóti hugskotinum at seta Strendur á ferðavinnubreddan.

– Ongin okkara hevur tosað nakað um pening, tí tað snýr seg í nógv størri mun um at fáa sett nakað í gongd við teimum kreftum, sum finnast á staðnum, sigur Sámal Bláhamar. Hugskotini eru nógv. Ikki einans hevur Strendur einasta spunavirkið, men somuleiðis einasta málingavirkið í landinum. Eitt av hugskotunum er at lata skúlanæmingar fara undir at mála bygningarnar hjá Snælduni, og at Stranda Máling letur máling til ein lagaligan kostnað.

### Keypa fløskur til kelduvatn

Ein onnur ætlan er at nýta Effo-støðina sum eitt slag av móttøku fyri ferðafólk. Støðin er nakað av tí fyrsta, ein fær eygað á, tá koyrt verður til Strendur.

– Ætlanin er at seta eitt stórt skelti upp á norðara húsaveggin, har víst verður til, at kunning um økið kann fáast inni á støðini. Her ber sjálvandi til at keypa ymiskt, og eisini er eitt stórt rúm aftanfyri, har fólk kunnu njóta eitthvørt til matna ella drekka. Ella bara hvíla seg, sigur Sámal Bláhamar.

Strendur er somuleiðis kent fyri gott kelduvatn. Eisini her hevur »the grand old man« innan føroyska ferðavinnum fingið eitt gott hugskot.

– Tað skal bera til at keypa eina tóma fløsku frá Føroya Bjór fyri so og so nógv í panti, og síðani fylla sær hana við kelduvatni úr eini slangu, sum liggur fram við Selatraðsvegnum, sigur Sámal Bláhamar.

Ætlanin er, at næmingar úr skúlanum á Strondum skulu tekna eina etikett, sum verður sett á fløskurnar til kelduvatnið. Um tey vitjandi ikki taka fløskuna heim við sær, fáa tey pantið aftur við at lata fløskuna innaftur.

### Fleiri fornminni

Strandingar stovnaðu fyri umleið tveimum árum síðani eitt fornminnisfelag, ið er sera virkið. Eitt av gomlu húsunum á Strondum er handilin á Sjóvarhøvda, sum Niels Jacob Nielsen, reiðari, eigur. Umframt at sjálvur bygningurin er áhugaverdur, eru rættiliga nógvir lutir og innbúgv, sum eru verd at varðveita. Tað fer tó at taka nakað tíð og orku at seta alt í stand, men tað eru ætlanir um skjótast at fáa sett gongd á hetta arbeiðið.

Somuleiðis er Sjóvar Kirkja, ið er ein av teimum størru svørtu triekirkjunum her á landi, avgjørt eina vitjan verd.

Strendur liggur ytst á vestaru síðu á Skálafjørðinum, og tí var bygdin týdningarmikil hjá bretska hervaldinum undir seinna veraldarbardaga. Nógvar leivdir standa eftir frá teirri tíðini, ið eru áhugaverdar at hyggja nærri at.

Sostatt hevur Strendur nógv at bjóða ferðafólkum, eins og teimum føroyingum, ið kundu hugsa sær at lagt leiðina hagar.

## Fakta

**Sjóvar Kommuna fevnir um bygdirnar Innan Glyvur, Strendur, Kolbeinagjógv, Morskranes og Selatrað. Til kommununa hoyra umleið 70 merkur í jørð. Í januar búðu 975 fólk í Sjóvar Kommu, og skattainntøkan í 2010 var 23,4 mió. krónur. Hvussu gomul Sjóvar sókn er, ber ikki til at staðfesta, men helst gongur hon aftur í 15. øld. Navnið Sjóvar sókn kemur av býlinginum við Sjógv á Strondum, har kirkjan stendur. Frammanundan hesi kirkjuni, ið varð bygd í 1834, hava kirkjur staðið har í fleiri hundrað ár, ella so langt aftur søguligar keldur røkka. Kirkjan við Sjógv var einasta kirkjan í sóknini heilt upp til okkara tíð. Á Selatrað kom kirkja í 1927.**

(kelda: sjovarkommuna.fo)




*Stórar ætlanir eru við at standseta hugnaliga handilin á Sjóvarhøvda, ið hevur sæð soleiðis út síðani einaferð í trýatiárunum*



*Eitt trekkplástur á Strondum eru føroysku vørurnar frá Snælduni, ið er einasta spunavirki, sum er eftir í Føroyum*